5-mannafør, dreingir:

# Argjadreingir settu vertirnar upp á pláss

**Á Norðoyastevnu vóru teir næstfremstir, og á Skálafjørðinum eydnaðist tað Bliki at troka Spógvan burtur av fremsta plássinum**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Kappingin stóð alla tíðina millum somu bátarnar, sum á Norðoyastevnu vóru við í kappingini um fremsta plássið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Á Norðoyastevnu vóru teir ov stuttir. Tá vann nýggi báturin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ. Á Skálafjørðinum varð lagt upp til, at Spógvin skuldi verja heiðurin og æruna hjá vertunum. Tað eydnaðist ikki. Argjadreingir vóru teimum ov boysnir. Eftir fyrstu tøkini í startspurtinum var Blikur fremstur, og hann helt seg á tí plássinum alla tíðina.

– Vit vóru eitt lítið sindur trilvandi á allar fyrstu tøkunum. Men vit mistu ongantíð nakað serligt í mun til teir, sum vit roknaðu við, at vit skuldu kappast við. Tá ið vit fóru niður á lunnin, kendu vit beinanvegin, at vit vóru væl við. Vit hildu okkum til tað, sum vit frammanundan høvdu avrátt, og tað var nóg mikið.

Bogi Augustinussen er annar av lærmonnunum á Bliki. Hann er bátsformaður, og hann er ein av trimum, sum eisini róði við Bliki í fjør. Hinir báðir eru stýrimaðurn og so annar av rúmmonnunum.

Dreingjamanningin umborð á Bliki er henda: Kristoffur Dam Joensen, Bogi Augustinussen, Knút Jarnskor, Áki Olsen, Eli Haralsen Hultgren, Petur Mortensen og Gunnar Poulsen.

Vóru tit alla tíðina greiðir yvir, at tit vóru fremstir?

– Vit høvdu Spógvan tætt hjá okkum. Á Norðoyastevnu var lá hann ikki so langt frá okkum. Tá segði stýrimaðurin hjá okkum beinanvegin, tá ið vit vóru komnir á mál, at Spógvin var frammanfyri okkum. Ta ferðina taptu vit, tí endaspurturin var ikki nóg góður hjá okkum. Hesa ferð vitsu vit, tá ið vit komu á mál, at vit høvdu vunnið á Spógvanum, og vit hildu okkum eisini at hava vunnið á Havfrúnni. Vit hildu okkum hava kappast við Fípuna Føgru um fremsta plássið. So vísti tað seg, at vit høvdu vunnið, og at tað var Spógvin, sum var nummar tvey, greiðir Páll Augustinussen frá.

Á málinum var fjarstøðan frá Bliki og aftur til Spógvan ein stór hálv bátslongd. Kappingin stóð alla tíðina millum somu bátarnar, sum á Norðoyastevnu vóru við í kappingini um fremsta plássið. Beinanvegin eftir startspurtin vóru tað Havfrúgvin, Blikur og Spógvin, sum lógu framvið í kappingini um fremsta plássið, og bátarnir hjá Klaksvíkar Róðrarfelag vóru eisini væl við. Fípan Fagra endaði á fjórða plássinum, og Tekla gjørdist nummar fimm. Fjarstøðan frá Bliki og aftur til Teklu var stívliga tvær bátslongdir.

Tvey tey seinastu árini hevur Sílið hjá Havnar Róðrarfelag verið FM vinnari, og tey bæði árini frammanundan var Tjaldrið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ FM vinnari. Hesa ferð var Sílið nummar átta, og Tjaldrið varð nummar ellivu. Drekin var nummar sjey, og Firvaldur av Tvøroyri sníkti seg inn á sætta plássið, sum gav honum eitt stig.

Spenningurin í FM kappingini er so stórur, sum tað ber til. Spógvin og Blikur liggja borð um borð við tólv stigum í part.

### 5-mannafør, dreingir

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 5:26:07 |
| 2 | Spógvin | 5:28:18 |
| 3 | Havfrúgvin | 5:30:06 |
| 4 | Fípan Fagra | 5:32:12 |
| 5 | Tekla | 5:33:11 |
| 6 | Firvaldur | 5:36:10 |
| 7 | Drekin | 5:38:19 |
| 8 | Sílið | 5:40:01 |
| 9 | Royndin Fríða | 5:42:03 |
| 10 | Kollur | 5:43:14 |
| 11 | Tjaldrið | 5:44:13 |
| 12 | Svanur | 5:46:16 |
| 13 | Báran | 5:49:18 |

5-mannafør, gentur:

# Tær á Argjum settu Havnina upp á pláss

**Eftir triðja plássið í Klaksvík, har sum Sílið vann, býttu tær á Argjum og tær í Sílinum um pláss í Runavík**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Allan vegin frá starti til mál var at kalla eingin munur millum bátarnar í genturóðrinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fýra teir fremstu bátarnir á Skálafjørðinum leygardagin vóru teir somu, sum endaðu á fýra teimum fremstu plássunum í Klaksvík. Men hesa ferð var røðin øðrvísi, enn hon var ta ferðina. Tá vann Sílið hjá Havnar Róðrarfelag, og Blikur á Argjum varð nummar trý. Hesa ferð vann Blikur, og Sílið var nummar trý. Tað ber við sær, at hesir báðir bátarnir liggja borð um borð í FM kappingini.

Í Klaksvík varð Havfrúgvin nummar tvey, og Firvaldur varð nummar fýra. Á Skálafjørðinum varð Firvaldur av Tvøroyri nummar tvey, og Havfrúgvin úr Vestmanna varð nummar fýra. Tískil liggja hesir báðir bátarnir borð um borð í kappingini um triðja plássið.

Tað gekk rættuliga javnt á alla tíðina á Skálafjørðinum. Kappingin stóð millum Firvald og Blik, sum bara var skutin undan tvørábátinum.

– Vit kendu alla tíðina á okkum, at tað sá ikki so galið út.Vit vistu, at vit vóru við í kappingini, og vit sóu, at Sílið, sum vit roknaðu at vera ein av vandamiklastu bátunum at kappast við, var aftanfyri okkum. Men vit vóru ikki greiðar yvir, hvat nummar vit vóru. Tá ið vit vóru komnar á mál, hildu vit okkum vera nummar trý. So rópti onkur, at Firvaldur hevði vunnið, tí tað hevði útvarpið sagt. Aftaná varð staðfest, at vit høvdu vunnið, og tað var ein deilig kensla. Vit hava vant við róðrarmaskinum og við at renna síðani eina ferð í januar. Fyrst í apríl fóru vit so í bátin. Fyri einum mánað síðani vórðu vit noyddar at skifta eina út, tí hon hevði fingið skaða í ryggin. Tann, sum kom umborð, hevði róð í fjør, og nú kenna vit okkum at vera sera væl fyri, sigur Anna Andresen, sum er bátsformaður umborð á Bliki á Argjum.

ríggjar umborð á Bliki róðu eisini í fjør, og fýra hava ongantíð róð áður. Manningin er henda: Joan Mikkelsen, Anna Andresen, Marna Rubeksen, Jóna Thomsen, Maud Poulsen, Maiken Petersen og Elsa Magnussen.

Í fyrstu atløgu royndi dómarin at leggja 5-mannaførini við gentum til fasta startin, men tað eydnaðist ikki. So varð roynt við leysum starti. Blikur kom væl frá tí, og tær vóru fyrstar á mál. Munurin frá nummar eitt og til nummar tvey var eitt hálvt sekund. Firvaldur var mest sum leysur av Sílinum, sum var í tættari kapping við Havfrúnna um triðja plássið.

Longu sunnudagin var Blikur við gentumanning aftur at síggja á Havnarvág. Tær vandu aftur týsdagin, og tær skulu venja aftur í dag og í morgin. So verður báðurin kýndur og klappaður, áðrenn tað leygardagin aftur verður kapping og álvari. Ta ferðina verður kappingin í Hvalvík, og ta ferðina ætla tær á Argjum sær aftur at vinna. Tað ætla tær í Havnini, Vestmanna og á Tvøroyri sær eisini. Tað er lagt upp til rættuliga spennandi kapping, og tað er ikki í mongum kappingum, at talan er um so opna kapping, sum tað er millum 5-mannaførini við gentumanningum.

### 5-mannafør, gentur

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 5:51:02 |
| 2 | Firvaldur | 5:51:15 |
| 3 | Sílið | 5:54:23 |
| 4 | Havfrúgvin | 5:55:07 |
| 5 | Junkarin | 5:58:12 |
| 6 | Ørnin | 6:00:01 |
| 7 | Frúgvin | 6:01:02 |
| 8 | Drekin | 6:02:21 |
| 9 | Fípan Fagra | 6:03:09 |
| 10 | Tjaldrið | 6:16:14 |
| 11 | Falkur | 6:17:14 |
| 12 | Spógvin | 6:25:00 |
| 13 | Hvassi | 6:29:04 |
| 14 | Tekla | 6:36:03 |



6-mannafør, menn:

# Teir duga ikki og kortini vinna teir




*Tað var nú mest til stuttleika, at teir á Jarnbardi fóru at rógva kapp. Og tað er so sanniliga eisini stuttligt at fáa gullmerkini handað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað var fyri at fáa vektina niður og konditiónina upp, at sjómansskúlanæmingar, sum ongantíð hava róð áður, fóru at venja við Jarnbardi, sum teir nú eru bestir við**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Menninir á Jarnbardi gjørdu leygardagin sum kvinnurnar umborð á Jarnbardi. Teir vunnu sína kapping. At Jarnbardur vinnur á somu stevnu bæði við monnum og kvinnum kemur ikki fyri á hvørjum ári.

– Tað var beinanvegin onkur, sum segði, at hetta var søguligt, tí hetta skuldi vera fyrsta ferðin, at báðar manningarnar vunnu á somu stevnu. Men hetta varð skotið niður aftur beinanvegin. Tað varð upplýst, at eina ferð áður hevur Jarnbardur vunnið við bæði monnum og kvinnum á somu stevnu, og tað var á Vestanstevnuni í fjør.

Kjartan Mohr er bátsformaður umborð á Jarnbardi, og tað er hann, sum veit hesi tíðindini. Men hann er skjótur at leggja afturat, at nú má eingin heingja hann upp á nakað, tí hann er spildurnýggjur í róðrarumhvørvinum.

Og tú ert longu bátsformaður á 6-mannafarinum, sum er betri enn hini?

– Hetta er fyrsta árið, at fleiri okkara leggja álvara í kappróðurin. Onkrir okkara hava luttikið í kappróðri fyri einum tveimum árum síðani, men tá vandu vit ikki seriøst. Tað gera vit nú. Tveir ganga á sjómansskúla, ein er liðugur í sjómansskúlanum fyri stuttum, og ein gongur í maskinmeistaraskúla. Tíðliga í ár gjørdu vit av, at vit skuldu royna at manna Jarnbard. Málið var fyrst og fremst at missa eitt sindur av vektini, sum kanska var vorðin í so stór. Nógva og miðvísa venjingin hevur havt við sær, at vit hava rokkið primera málinum. Nú eru vit komnir í so mikið góða venjing, at tað ber til at kappast um fremstu plássini, og nú vit vunnu á Skálafjørðinum, eru vit vornir heilt spentir, greiðir Kjartan Mohr frá. Hann og bátsfelagarnir umborð á Jarnbardi hava ilt við at bíða inntil leygardagin, tá ið teir aftur fáa høvi at kappast.

Elsti maður umborð er bátsformaðurin, sum er 27. Stýrimaðurin er 16, og hinir eru har ímillum. Manningin er henda: Kristian Eysturoy, Schønning Hentze, Ásmund Zachariassen, Petur Kristian Nielsen, Árant Løkjá, Rúni Mohr og Kjartan Mohr, sum altso er bátsformaður.

Nær vart tú greiður yvir, at tað kundi bera til hjá tykkum at vinna?

– Eftir Norðoyastevnuróðurin vóru vit greiðir yvir, at vit kundu standa okkum betri, enn vit gjørdu ta ferðina. Tá høvdu vit onkrar smávegis trupulleikar, sum gjørdu tað eitt sindur torført hjá okkum. Men kortini vóru vit við í kappingini heilt har frammi, har fjarstøðan frá nummar eitt og til okkum á fjórða plássinum bara var tvey sekund.

– Hesa ferð var alt, sum tað skuldi vera. Eg haldi, at vit vóru fremstir, eftir at tey fyrstu fimtan tøkini vóru tikin, og so vóru vit á odda alt málið. Munurin var ikki so stórur. Aftur hesa ferð vóru tað Sundabáturin, Gongurólvur og Strálan, sum kappaðust við okkum, og eg rokni við, at tað eisini tær næstu ferðirnar í hvussu so er fara at vera hesir, sum fara at bjóða okkum av.

*Hvat er stóra styrkin hjá tykkum?*

– Vit eru í góðari likamligari venjing. Vit eru treiskir, men eg haldi ikki, at vit eru serliga góðir kapprógvarar. Vit eru ikki upplærdir at rógva taktiskt, og vit hava heldur ikki serliga gott lag, men vit orka, og vit vilja vinna, heldur Kjartan Mohr.

Bátsformaðurin umborð á Jarnbardi heldur, at unga manningin umborð á Gongurólvi hevur stak gott róðrarlag. Hann væntar eisini, at nýggja Strálan fer at gera nógv fyri at vinna, og hann vísir á, at Sundabáturin longu á Norðoyastevnu gjørdi vart við seg.

Fyri tey norðuri í Sundi kendist leygardagurin eitt sindur snópisligur. Fitt av áskoðarum fylgdu Sundabátinum um Leirvíksfjørð og út á Skálafjørðin. Gongurólvur vann kappingina við Sundabátin um næstfremsta plássið, men munurin var lítil og eingin.

Sundbáturin fekk syndarliga vánaligan start. Eftir startspurtin vóru teir eina løtu aftastir, men so komu teir so spakuliga fyri seg. Tað vóru trupulleikar umborð á Sundabátinum fyrstu løtuna. Ein reim, sum spenti pútuna hjá einum av rógvarunum fasta, slitnaði, og eina løtu lá ikki fyri hjá hesum at spenna rættuliga í. Strálan endaði bara eitt sekund aftanfyri Sundabátin. Eingin ivi er um, at teir báðir saman við Gongurólvi fara at bjóða Jarnbardi av í Hvalvík leygardagin.

### 6-mannafør, menn:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 07.45.18 |
| 2 | Gongurólvur | 07.47.07 |
| 3 | Sundabáturin | 07.47.18 |
| 4 | Strálan | 07.48.18 |
| 5 | Lómur | 07.53.11 |
| 6 | Sølmundur | 07.55.11 |
| 7 | Hósvíkingur | 07.59.12 |
| 8 | Víkingur | 08.04.10 |
| 9 | Hvessingur | 08.07.22 |
| 10 | Sandingur | 08.09.24 |

## FM-kappróður

| 5-mannafør, dreingir | | Stig | Eystanst. |
|---|---|---|---|
| 1 | Blikur | 12 | 7 |
| 2 | Spógvin | 12 | 5 |
| 3 | Havfrúgvin | 7 | 4 |
| 4 | Fípan Fagra | 7 | 3 |
| 5 | Tekla | 3 | 2 |
| 6 | Sílið | 2 | 0 |
| 7 | Firvaldur | 1 | 1 |
| **6-mannafør, kvinnur** | | | |
| 1 | Jarnbardur | 14 | 7 |
| 2 | Páll Fangi | 10 | 5 |
| 3 | Lómur | 8 | 4 |
| 4 | Gongurólvur | 5 | 3 |
| 5 | Víkingur | 4 | 1 |
| 6 | Sølmundur | 3 | 2 |
| **5-mannafør, gentur** | | | |
| 1 | Blikur | 11 | 7 |
| 2 | Sílið | 11 | 4 |
| 3 | Firvaldur | 8 | 5 |
| 4 | Havfrúgvin | 8 | 3 |
| 5 | Junkarin | 2 | 2 |
| 6 | Fípan Fagra | 2 | 0 |
| 7 | Ørning | 1 | 1 |
| 8 | Frúgvin | 1 | 0 |
| **6-mannafør, menn** | | | |
| 1 | Sundabáturin | 11 | 4 |
| 2 | Jarnbardur | 10 | 7 |
| 3 | Gongurólvur | 10 | 5 |
| 4 | Strálan | 7 | 3 |
| 5 | Lómur | 3 | 2 |
| 6 | Víkingur | 2 | 0 |
| 7 | Sølmundur | 1 | 1 |
| **8-mannafør** | | | |
| 1 | Argjabáturin | 14 | 7 |
| 2 | Kvívíkingur | 9 | 5 |
| 3 | Nevið Reyða | 9 | 4 |
| 4 | Ørvur | 6 | 3 |
| 5 | Knørrur | 4 | 2 |
| **10-mannafør** | | | |
| 1 | Havnarbáturin | 14 | 7 |
| 2 | Nólsoyingurin | 9 | 4 |
| 3 | Eysturoyingur | 7 | 5 |
| 4 | Vestmenningur | 7 | 3 |
| 5 | Vágbingur | 5 | 2 |
| 6 | Hoyvíkingur | 2 | 1 |